[ *Januar* ]

# Gamla hetjan og ungu stjørnurnar



*Teitur Lassen, Eivør Pálsdóttir og Kári P syngja sama lag til nýggjárskonsertina, sum eisini var innsavning til tey neyðstøddu í Suðurasia*

**Eivør Pálsdóttir, Teitur Lassen og Kári P høvdu eina nógv umrødda framførslu saman, tá ið sjónvarpsshow var til frama fyri tey neyðstøddu eftir flóðalduvanlukkuna í Suðurasia**

Tað vórðu savnaðar slakar seks milliónir krónur, tá ið árliga nýggjárskonsertin gjørdist til eitt innsavningartiltak til frama fyri neyðstøddu offrini í Suðurasia.

Reyði Krossur hevði síðani vanlukkuna í desember 2004 savna pengar inn at senda sum neyðhjálp, og nýggjárskonsertin skuldi verða endaspurturin í innsavningini.

Bæði Útvarpið og Sjónvarpið sendu beinleiðis frá konsertini, og fólk fingu at vita, hvussu tey kundu lata eitt oyra til innsavningina.

– Tónleikurin gongur við fullari ferð, og eingin ivi er um, hvør stjørnan er. Eftir at dupultkvartettin í Ebenezer hevur brillierað, er Ernst Sondum Dalsgarð kongurin í Norðurlandahúsinum, og sum ein rættur Don Juan við síðum hári forførir hann alt og øll. Umframt operarøddina hevur hann sjarmuna og útstrálingina, sum tryggjar honum stjørnustatus, skrivar ummælarin hjá Sosialinum.

### Gamla hetjan viðaftur

Tað, sum fólk vóru serliga spent at hoyra, var gamli trubadoururin Kári P, sum ikki hevur verið so virkin innan tónleikin í nógv ár. Hann hevði eisini játtað at verða við á konsertini, og tað var við stórum spenningi, at fólk í Norðurlandahúsinum og kring landið bíðaðu eftir, at hann kom á pallin.

Og tá ið hann kemur fram í ljósið, er tað í fylgi við tveimum av bjartastu stjørnunum í føroyskum tónleiki nú á døgum – Eivør og Teitur. Tey bæði hava rættiliga gjørt vart við seg uttanlands, og hetta kvøldið sleppa tey at spæla saman við einum av teimum, sum gekk undan í føroyskum tónleiki í sjeytiog áttatiárunum.

– Tey trý sjarmera seg inn í hjørtuni á áhoyrarum, og fagnaðurin og lógvabrestirnir vilja ikki steðga, tá tey eru liðug. Stjørnutrioin kemur innaftur á pallin, men vit áhoyrarar fáa ikki tað eykanummarið, vit høvdu vónað, skrivar Sosialurin.

### Kári P fór heim

Millum sangirnar, sum tey trý sungu, var gamli klassikarin um Súrligar nætur í Keypamannahavn, og hesin sangurin hevur verið nógv at hoyrt í Útvarpinum síðani.

Og tá konsertin var liðug, var Kári P. skjótur í vendingini. Sosialurin skrivar:

– Millum smílandi andlitini skundar ein styggur maður við guitara á baki sær avstað. Øll vilja hálsfevna og heilsa uppá fólkakæra troubadourin, men hann er einki við uppá at steðga á. Kári p hevur leverað vøruna, fólk vilja sýna honum takksemi, men hann er einki við uppá at hoyra lovsongsorð. Hann sleppur sær skjótt út í myrkrið og illfýsna veðurlagið.

» Tað eru nøkur listarfólk, sum eftir øllum at døma halda seg vera betur enn hini, men áðrenn tey fara at finnast at listini hjá øðrum professionellum listarfólkum, áttu tey heldur at tikið í egnan barm.« «

*– Kári Svensson, listamaður*

» Eg vil pástanda, at ikki øll, men nógv fjølmiðlafólk eru ein beinleiðis forðan fyri demokratinum í Føroyum. Tíðindaflutningurin um bæði innlendis- og uttanríkismál er so einstáttaður, at eg haldi tað er ein trupulleiki fyri menningina av føroyska demokratinum. «

*– Jenis av Rana, politikari*

**ÍSF hevur síðani 2002 tikið nakrar og tjúgu dopingroyndir árliga av limum sínum. Enn hevur tó eingin roynd verið positiv.**

## Tann fyrsti var av Sandi

Tað vóru ikki meira enn 55 minuttir farnir av nýggja árinum, tá ið Dagunn Clementsen av Sandi átti ársins fyrsta barn – fyrsta føroyingin í 2005. Lítla diddan kom til verðina á Landssjúkrahúsinum, og hetta var fyrsta barnið hjá Dagunn og manninum, Eyðfinn.

– Eg var sett at eiga 21. desember, so læknin sendi meg til Havnar longu tann 10. desember. Eg havi hildið bæði hól og nýggjár her í Havn, segði tann fegna mamman.

## Sóla okkum í sorg

Fýra pedagoglesandi á Læraraskúlanum í Havn finnast at fyritøkum og handlum, sum alment boða frá, hvussu tey savna pengar tsunamihjálpina hjá Reyða Krossi. Summir handlar hava sagt, at ein partur av teirra inntøka eina ávísa tíð fer til Reyða Kross.

– Hví skulu fyritøkur og handlar lýsa við, at tey geva so og so nógvan pening til neyðhjálp. Hví kunnu fyritøkurnar ikki í stillum flyta pengarnar á kontoina hjá Reyða Krossi, uttan av vit skulu sáa iva um handilsligar baktankar við neyðhjálpini. Tað er blóðskeivt, at ávísar fyritøkur sóla sær í vanlukkuni, siga Johan í Kollafirði. Noomi á Válinum, Sanná Løgmansbø og Dagmar Clothier.

## Kvinnur taka við á Hafnia

7. januar var Hotel Hafnia formliga latið nýggju eigarunum. Harvið søgdu brøðurnir Restorff farvæl við eitt virksemi, sum teir saman hava rikið síðani 1971. MC og Johan hava verið ímyndin og blíða andlitið hjá Hotel Hafnia, men nú gevast teir. Í teirra stað eru komnar tvær kvinnur, Ása Johnsdóttir og Birna Gaard.

– Avgerðin hevur ikki kostað okkum náttarsvøvnin, men tað er sjálvandi við sorblídni, at vit siga farvæl. Okkara arbeiðsdagur á Hafnia er nú farin afturum, siga MC og Johan Restorff.